

*Hóast tað ikki var partur av skránni, so vildi Bubbi fegin hava Eivør á pallin at syngja eitt lag saman við sær*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

søgur upp úr eini bók. Hetta vísti enn einaferð, at hetta var ein mentanarupplivíng av teimum óvanligu, og gjørdi kvøldið enn meira dýrabært.

Framførslan hjá Eivør, varð ein tann besta, eg havi sæð hjá henni. Eivør byrjaði sum á AME við síni trummu og lagnum Trøllabundin. Lagið gerst alsamt betur fyri hvørja ferð hon spælir tað. Røddin er eitt ljóðføri, sum Eivør meistrar fullkomiliga, og tú gerst beinanvegin trøllabundin. Næsta lagið var Hjarta mítt, sum er eitt tað vakrast lagið Eivør eigur. Við eini rødd sum ljóðaði sum einglasongur óskyldig, rein og ótrúliga vøkur, bar hon orðini fram.

"Mær leingist" varð sum altíð sera góður. Tey fullu, góvust eina lítla løtu við at larma, og tá ein teirra miðskeiðis í sanginum byrjaði at larma aftur, varð hann endiliga smitaður út.

Vakrasta løtan á konsertini var frálíka nýggja lagið, um saknin eftir systrunum Elinborg og Elisabeth Mariu. Lagið er ordiliga vakurt og varð sungið so inniliga. Saknurin varð veruligur fyri okkum sum lurtaðu.

## Mótmælisfólk

Tá Eivør spældi "Just a friend of mine" byrjaði larmurin aftur. Tey flestu av hinum fullu vórðu smitaði út, tey mótmæltu og larmaðu sera illa. Aftan á konsertina, segði ein teirra við Sosialin. At teirra larmur var eitt mótmæli móti, at stór nøvn sum Bubbi, Stanley og Eivør vórðu brúkt á eini konsert, sum mest minti um eitt bland millum eitt ervi og eitt bønarmøti. Hann segði, at køkuborð og kaffi ikki hoyrdu heima á eini konsert við heimsnøvnum.

Mótmæli ella ikki. Tað var øðiliga órógvandi fyri stórar partar av áskoðarunum. Fyrireikararnir søgdu fríggjadagin við Sosialin, at teir høvdu eftirmett konsertina, og komnir ásamt um, at hesi sum larmaðu, skuldu verið koyrd á dyrð fyrr.

Nú varð endiliga rímiliga friðarligt, og Eivør fekk frið at spæla seinastu løgini. Hon endaði við at bjóða Stanley Samuelsen uppaftur. Saman sungu tey "Um eg kundi kvøði". Lagið er besta lag, eg havi hoyrt hjá Stanley, og ongantíð man tað vera framborið vakrari. Teirra røddir riggaðu avbera væl saman. Tá tey so endaðu við "Come to me" har Stanley sang røddirnar hjá Bill Bourne, ljóðaði tað nógv betur enn við Bill. Hetta varð ein frálíkur endi á eini frálíkari konsert.

Vágs POP

### Beinta, 23 ár av Argjum

Mær dámdi ordiliga væl, men Bubbi var nokkso keðiligur, hann hevði góða rødd, men sangirnir vóru keðiligir. Eivør og Stanley vóru góð, eisini saman.

### Jóna, 59 ár av Skála

Mær dámdi heilt einastandandi væl konsertina. Tann besta løtan var tá Eivør og Stanley sungu saman, tá dámdi mær øðiliga væl.

### Tove, 45 ár av Norðasta Horni

Konsertin var øðiliga góð. Men Bubbi spældi forbiðið leingi, eg skilji heldur ikki so væl tað íslendska, so tað bleiv eitt sindur keðiligt.

### Sólja, 22 ár av Argjum

Eivør var fantastisk. Eisini tá hon spældi saman við Stanley var tað framúr. Bubbi sang væl, men har varð so nógv møsn millum løgini, tað hevði verið betur uttan.